

**TVEY FYRI EITT**

*Tað er nú ikki so galið, at kunnu fáa eina hugnaliga løtu saman við tí uppvaksandi ættarliðinum, samstundis sum ein fær hárið sett upp*

# Tvey ættarlið

**SAMSTARV** Er tað nakað sum kann gleða okkara gomlu, man vera tað at fáa vitjan av børnum. Eitt slíkt samstarv er fingið í lag millum tveir av stovnunum á Eiði.

Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

**Eiði:** Tað er gott lag her við stovuborðið á eldrasambýlinum í bygdini.

Fyri løtu síðani settu nøkur av børnunum í barnagarðinum Korndalsgarði kósina teir fáu metrarnar niðan í Korndalsbýlið til eina hugnaliga løtu.

Børnini setast so hugagóð at gera okkurt prýði til jóla, meðan ein av eldru íbúgvunum á sambýlinum fær tvey fyri eitt: Hugnan saman við teimum yngru og hárið gjørt.

Um eina løtu munnu fleiri av teimum eldru fara at setast til borðs, og kanska tey eisini taka eina hond í, nú tað av álvara er farið at stunda til jóla.

Sum skilst á lagnum vitja børnini við ávísum millumbilum á sambýlum. Og líkt er til, at tey øll síggja fram til hesar løturnar.

Leggjast kann aftrat, at barnagarðurin varð tikin í nýtslu í august mánaði 2008 og sambýlið í september mánaði 1999.



**HUGNI**

*Hóast langt er millum aldurin, tykjast tey øll at hugna sær her í Korndalsbýlinum*